

**TOYOTA AVENSIS 2.4 SOL AUT.** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** KP 008 **Km:** 19.000
**Árgangur:** 14.06.2006

**kr. 264.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 1.8 ICO** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** LD 542 **Km:** 176.725
**Árgangur:** 22.10.2003

**kr. 148.000,-**



**TOYOTA RAV 4 2,0 VVT-I** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** VS 482 **Km:** 30.000
**Árgangur:** 04.09.2006

**kr. 274.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1.6 H/B**

**Skrásetingarnr:** UH 762 **Km:** 89.000
**Árgangur:** 06.02.2004

**kr. 135.000,-**



**PEUGEOT 306 2.0 HDI**

**Skrásetingarnr:** TR 147 **Km:** 187.000
**Árgangur:** 01.01.2001

**kr. 48.000,-**



**MAZDA B2500 D, MVG BILUR**

**Skrásetingarnr:** EV 679 **Km:** 69.000
**Árgangur:** 30.07.2002

**kr. 78.000,-**



**MAZDA 6** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** EL 469 **Km:** 47.000
**Árgangur:** 16.09.2005

**kr. 172.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 2.0 TD**

**Skrásetingarnr:** LU 900 **Km:** 125.000
**Árgangur:** 19.08.1999

**kr. 75.000,-**



**MAZDA 626 2.0 TDI**

**Skrásetingarnr:** SV 702 **Km:** 213.000
**Árgangur:** 10.11.1998

**kr. 64.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1.6 LUNA B. H/B** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** TG 470 **Km:** 50.000
**Árgangur:** 11.05.2005

**kr. 158.000,-**

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

**6 mánaða garanti**

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, i eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

**REYNI SERVICE** P/F

# Enn ein perla

**Hátíðardámur á Tvøroyri um vikuskiftið, tá stásiligu pakkhúsini hjá kgl. einahandlinum vórðu tikin í nýtslu sum mentanar- og ungdómshús**

**MENTAN**
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Nú kann Suðuroyggin erpa sær av enn einari vakrari perlu. Hetta vikuskiftið vórðu nýumvældu pakkhúsini hjá Thomsens tikin alment í nýtslu. So nú kunnu mentan, lív og ungdómar aftur fylla gamla havnarlagið á hesum søguliga bletti, sum hevði sína stórheitstíð fyri mongum árum síðani sum fiska- og handilsmiðstøð landsins.

Eins og við vælumtóktu Pubbini, sum lat upp fyri knøppum ári síðani, er tað eldsálin Anna Kirstin og bróðurin Thomas Thomsen, sum eru stigtakarar til mentanarverkætlanina “Seglhúsloftið”, meðan Pakkhús 4 hýsir ungdóminum í býnum.

Um vikuskiftið vórðu hølini formliga tikin í nýtslu, og tað var í hesum sambandi, at ein hópur av fólki høvdu leitað sær suður til móttøku.

Og sum altíð, tá ið suðuroyingar hava nakað at hátíðarhalda, var tað gjørt við pomp og pragt. Fyrst var almenn móttøku fríggjadagin, og leygardagin var stór veitslu fyri innbodnum og rimmar almennum dansur aftaná. Seglhúsloftið var karmur um alt hátíðarhaldið og stóð royndina við bravur.

- Nógv søgdu, at eg var púra ør og at hetta ongantíð fór at ganga - men hygga nú. Vit hava longu fingið fleiri fyrispurningar um at leiga hølini til tiltøk, fundir, ráðstevnur og veitslur, so hetta er avgjørt tiltrongt, segði ein væl nøgd Anna Kirstin Thomsen, meðan hon vísti okkum runt í nýumvældu bygningunum.



*Ein fegin og altíð gestablíð Anna Kirstin Thomsen til móttøkuna á Tvøroyri fríggjadagin* *Mynd: Talgilt*

## Nýtt og gamalt

Her er eisini nógv at vera errin av, tí hetta eru ikki eiti á hølum: ”Seglhúsloftið” eru tríggjar ljósar og rúmligar hæddir, innrættaðar við støði í upprunaliga sniðinum við trægólvum, hvítum múraðum veggum, sjónligum bitum og sprossavindeygum. Í neðra er væl útgjørdur ídnaðarkøkur, gardaroba og vesir, meðan ovaru hæddirnar hava fleiri stór høli, pall og ein stásiligan barrdisk úr skínandi kopari, sum Dennis Lava, snikkari, hevur gjørt.

Tað fer at bera til at leiga allar tríggjar hæddirnar, ella bara ein sal.

– Her verða til dømis tríggjar konfirmatiónir sama dag í oktober. Og fólk mugu sjálvi avgera, um vit skulu gera matin til teirra, ella tey leiga seg inn í køkin við egnum kokki, sigur Anna Kirstin, sum hevur fingið skonkiloyvi og dansiloyvi, umframt uttandura skonkiloyvi.

- Hetta er sera týdningarmikið í dag, har fólk krevja at fáa eitt glas av víni, tá tey hava frí, sigur Anna Kirstin.

– Eg ætli mær eisini at skipa fyri dansivikuskiftum fyri fólki norðanífrá, sigur Anna Kirstin, sum er víðagitin dansilærari.

## Friðað umhvørvi

Albert Isfeldt, arkitektur, hevur teknað hølini í tøttum samstarvi við Tórolv Weihe, arkitekt, frá Fornminnissavninum. Av í at alt umhvørvið er friðað, hevði tað stóran týdning, at alt varð varðveitt í upprunaliga sniðinum, so alt timbur og snikkaraarbeiðið er gjørt eftir gomlum byggihættum.

- Petur Hammer hevur staðið fyri timburarbeiðinum. Til dømis er alt timbrið felt niður í hvørt annað - ongir naglar ella skrúvur eru nýtt, sigur Anna Kirstin, meðan hon vísir okkum runt. Allir skilaveggir eru múraðir upp eftir gomlum byggihátti, og hetta hevur múrarin Sven Roast staðið fyri.

## Stór íløga

Verkætlanin fevnir um eina íløgu uppá einar 5–6 milliónir krónur. Onnur enn Thomsens hava eisini sett partapening í. Til dømis Royndin, sum er íløgufelag til frama fyri íverksetan undir Tryggingarfelagnum Føroyar. Richard B. Thomsen á Tvøroyri hevur sett í, umframt trolarin Brestir hjá Poul Hansen. Eisini hevur Føroya Shell latið eina pengingagávu, og Fornminnissavnið hevur eisini stuðla, tí bygningarnir eru friðaðir. Tvøroyrar Kommuna stuðlar á tann hátt, at hon leigar